# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tøgn í Tinganesi

Tá fíggjarkreppan fyri nøkrum mánaðum síðan byrjaði í USA og tað gjørdist greitt, at kreppan fór at breiða seg til umheimin, mæltu vit landsstýrissamgonguni til at búgva seg til. Vit vístu á, at søguligu royndirnar bendu á eina búskaparkreppu í kjalarvørrinum á fíggjarkreppuni, og vit gjørdu vart við, at borgarar og vinna áttu at kunna rokna við, at landsins myndugleikar vóru fyrireikaðir til hesa nýggju og álvarsomu støðu. Avvarandi føroyskir mynguleikar áttu alt fyri eitt fara undir at evna til eina strategi til tess at takla ta búskaparkreppu, sum helst fór at koma í kjalarvørrinum á fíggjarkreppuni.

Um allan framkomna heimin gjørdu stjórnir seg til reiðar at taka ímóti fíggjarliga og búskaparliga ódnarveðrinum. USA tveitti eftir einari nátt alt gamalt neoliberalistiskt arvagóðs á bláman og samveldisstjórin hevur lagt ein kreppupakkan fyri og annan eftir á borðið hjá samveldistinginum. Onnur lond hava fylgt eftir. ES hevur júst samtykt eina víðfevnda ætlan til at tess at byrgja fyri verstu avleiðingunum av eini vaksandi búskaparkreppu. Hesin kreppupakkin er ætlaður sum eitt ískoyti til tey stóru krepputiltøk sum einstøku limastjórnirnar hava sett í verk. Uttan fyri ES hevur eitt nú Noreg júst sett í verk eina fíggjarliga og búskaparliga ætlan, har fleiri milliardir norskar krónur verða til taks hjá privata ídnaðaðinum, fyrst og fremst skipasmiðjunum, til tess at bjarga teimum undan húsagangi. Danska stjórnin er til reiðar við einum nýggjum búskaparligum hjálparpakka.

Hetta verður alt gjørt í ásannan av, at fíggjarkreppan er ógvuslig, at búskaparligu avleiðingarnar eru so umfatandi, at tað almenna noyðist at leggja uppí. Staðfest er, at kreppan er lík teirri fíggjar- og búskaparkreppu, sum í trýatiárunum elvdi til búskaparligan, sosialan og politiskan ruðuleika um allan heimin. Men hvussu er so vorðið her hjá okkum? Alt fleiri tekin eru um, at kreppan nærkast. So seint sum í morgun fræettist í útvarpinum hjá Kringvarpi Føroya, at føroyskir húsaánarar hava mist tvær milliardir í frívirðum. Fleiri fyritøkur eru í álvarsomum trupulleikum og onkur er farin á húsagang. Hóast arbeiðsloysið er metlágt, so eru tekin um eina broyting skeiva vegin og verður nú talað um eitt arbeiðsloysi svarandi til 4-5% við árslok 2009.

Hóast tekin um, at álvarsamir fíggjarligir- og búskaparligir trupulleikar eru við at raka føroyska samfelagið, so tykist hetta ikki at nerva landsstýrissamgonguna. Í Tinganesi valdar tøgn um hetta álvarsmál, sum eitt umboð fyri fakfelagsrørsluna tók til í sjónvarpinum í gjárkvøldið. Hetta er løgið og kundi bent á, at føroyska stjórnin sum tann einasta um okkara leiðir ongan kreppupolitikk hevur tøkan ella kanska ætlar at lata marknaðarkeftirnar einsamallar greiða hetta álvarsliga samfelagsmál. Tað ber eisini til men bert við sera stórum politiskum, samfelagsligum og menniskjanligum kostnaði. Um landsstýrissamgongan hinvegin hevur eina ætlan ella eina strategi, so er tíð at kunna um hesa nú.

**Sosialurin**

## Grøðiligur illvøkstur

SONNE SMITH



Tað kostar mett slaka 1,4 milliónir krónur um árið við vaksinatión at royna at byrgja fyri, at 350 12 ára gamlar gentur í Føroyum fyrr ella seinni kunnu fáa krabbamein í lívmóðurhálsin. Tað hava vit ikki ráð til. Ella, tað hava vit sum skilst onga játtan til á fíggjarlógini. Sama hvør samgonga valdar, so eru vit summi, sum nokta at trúgva, at tað kann vera so livandi galið, at uppskotið á Tingi um, at landið rindar koppsetingina, verður vrakað bara tí, at tað er eitt uppskot frá andstøðuni. So fákunnug kunnu vit ikki vera. Tað kann ikki bera til, at vit lata okkum lynda, at ein so idiotiskur leikur gongur á okkara fólkavalda palli. Tí eingin ivi kann vera um, at fær ein einasta av hesum 350 gentunum krabbamein í lívmóðurina, so kostar tað minst 1,4 milliónir krónur – kanska tríggjar ferðir so nógv enntá – at viðgera henda ógvuliga hættisliga tilburð av krabbameini. Tann ólukkuliga kvinna við hesi deyðiligu sjúku verður saman við næstringum sínum send aftur og fram millum Ríkissjúkrahúsið og Føroyar eftir at hava fingið millum 30 og 60 stráluviðgerðir sum ein roynd at støðga krabbavøkstrinum. Tann ólukkuliga kvinnan verður løgd undir manga aðra ótýdliga viðgerð, ið kanska útsetir seinni eitla- og stomiviðgerð, ið so aftur hava beint fyri øllum lívsvirði, um nakað lívsvirði er at hóma yvirhøvur. Samanumtikið kann tað saktans henda, at ein viðgerð fyri milliónir bara útsetti ta ultimativu avleiðingina. Kvinnan doyr, og næstringarnir eru meinskaðir djúpt inn á líkam og sál.

Og so hava vit onga játtan á fíggjarlógini ...

**Eldrabyrðan**

Vit hava heldur onga játtan á hesi ella hasi fíggjarætlan at kompensera fyri einum lítlum sindri av lívsíløgunum hjá mongum av okkara gomlu. Tvørturímóti. Tað ljóðar, at hetta og hatta tilboð til teirra, ið nú eru vorðin partur av ELDRABYRÐUNI, kostar ov nógv. Her má skerjast!

Tann fyrsta mai fáa mong okkara frítíðarløn ella - ískoyti av tí, vit hava tjent í eitt ár. Tey flestu av okkara gomlu hava arbeitt alt sítt lív og hava alt sítt lív goldið sín part av teirri frítíðarlønini, vit rópa pensjón. Men tað ólukkuliga er hent, at vit hava fingið eitt fyribrigdi, ið vit eru farin at rópa útreiðslur til ELDRABYRÐUNA. Og sjáldan eru tey gomlu pírin, tá ið tað ræður um at geva ommu- og abbabørnum so nógvar pengar, at tað í sjálvum sær er eitt flott ískoyti hjá landskassanum av øllum avgjaldinum, ið kemst av, at tey ungu leggja stjórt avgjald eftir seg fyri eitt vanligt, modernað marglætislív. Ímeðan hvørvur møguleikin hjá mongum gomlum at verða strikað á akuttlistanum, tí tey eru rætt og slætt deyð, áðrenn røktarpláss er fyri teimum.

Neyðars starvsfólk, ið altíð eru tey ábærastu ...

Og so hava vit ov lítla játtan á fíggjarlógini ...

**Danland**

Vit hava goldið 30 milliónir fyri Smyril Line, soleiðis at felagið sambært teimum ráðandi fær eitt burðardygt høvi afturat at rationalisera raksturin. Burtur við Bretlandi og Norra og Íslandi. Ferðamálið, ið eftir er, eitur Danland. Har kunnu vit aka á reyvini eftir eini plastslisku og tjumsa í eitt plastílat, tey rópa pool. Og so kunnu vit grilla, drekka øl og vín og tað, ið verri er. Tað ger einki. Vit hava vaskað okkum um hendurnar. Ímeðan royna summi okkara heilt spastiskt at greina eitt fantastiska merkiligt fyribrigdi: Politikarar og ráð mæla frá, at sterkari løgur verður gjørdur í hesum lovaða landi, tí tað verður bara atkomiligari enn, um hesin løgur verður gjørdur aðrastaðni. Havnin er vorðin tað stóra Sodoma við øllum sínum vertshúsum við øllum sínum innflutta Deyðans Vatni, synonymið fyri Lívsins Vatn, sum kinesarar fyri alt tað høvdu 2000 ár f.Kr, og sum Aristoteles skrivaði um 300 ár f.Kr.

Samstundis er líkt til, at eitt tað sterkasta og ringasta eitur í verðini, nikotin, eigur at vera ein týðandi táttur í okkara almennu inntøkukeldu.

Pilatussymdromið leingi livi!

Vit halda við góðari, reinari, kristiligari samvitsku fram við at flyta okkara syndir til Havnar, og haðani verður ábyrgdin av syndunum flutt til Danmarkar ...

## Eitt løgið fyribrigdi!

TORDUR J. NICLASEN



Samstundis sum landsstýrið sigur seg ikki hava pening (1.4 milliónir) til at fremja **krabbameins- fyribyrgjandi** tiltøkum (lívmóðirháls krabba), velur sama landsstýri framhaldandi at stuðla **krabbameinselvandi** tiltøkum (tollfríar sigarettir) við 18 milliónum árliga!

Skilji hetta, hvør ið skilja vil.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.